## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Fleyr til gul av landsynningi, seinnapartin veksur hann vindin upp í ein strúk. Sólglottar, men eisini okkurt ælið. Hitin millum 3 og 6 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Gul til stívt andøvsgul av eysti og landnyrðingi og sólglottar, men eisini okkurt regn~ella vátaslettingsælið. Hitin millum 3 og 6 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Lot til andøvsgul av landsynningi og eystri ælingur, men eisini sólglottar og hitin millum 3 og 6 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av eystri og landnyrðingi og ælingur, partvís vátaslettingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 2 og 6 stig.

# Tveir metrar av kalva

**Tað var ein øgilig sjón, sum manningin umborð á Vesturland møtti á seinasta túrinum.**

FISKISKAPUR
*Snorri Brend*

Meðan teir drógu, løgdu teir merki til ein sera stóran kalva á línuni. Og tá hann var drigin innanborða vísti tað seg, at teir høvdu rætt í hesi metingini.

Kalvin var tveir metrar langur og ein metur breiður. Teir mettu hann til eini 100 kilo, men tá samanum kom vá hann 92 kilo, vísti altso vektin hjá Beta í Saltangará.

Vanliga átti ein slíkur kalvi vigað heldur meiri, men hesin var í rakara lagi. Og tað sást eisini aftur á vektarseðlinum!



*Praktikantur okkara, Ragnar Borðoy av Oyrarbakka er bæði lægri – og helst eisini léttari! – enn stóri kalvin*
*Mynd: Ólavur Frederiksen*

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -24 |
| Nuuk | -17 |
| Qaqortoq | -15 |
| Ammassalik | -3 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 0 |
| Seyðisfjørður | 2 |
| Tórshavn | 5 |
| Lerwick | 6 |
| Aberdeen | 7 |
| London | 8 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 6 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 5 |
| Keypmannah. | 5 |
| Helsinki | 4 |
| Moskva | 0 |
| Berlin | 10 |
| Warzawa | 11 |
| Kiev | 4 |
| Bukarest | 8 |
| Paris | 8 |
| Madrid | 13 |
| Róm | 13 |
| Malorca | 16 |
| Athen | 16 |
| Malta | 15 |
| Tunis | 13 |
| Beijing | 21 |
| New Dehli | 27 |
| Bangkok | 30 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | -- |
| New York | 3 |
| Miami | 16 |
| Los Angeles | 19 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | -- |
| La Paz | 12 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 25 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 998 hPa. við Hetland fer spakuliga norðureftir.



**Í dag:**
Lágtrýstið sunnan fyri Ísland fer spakuliga suðureftir og dýðist.Brúgvalagið haðani verður nær Føroyum komandi samdøgur.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 26/3 kl. 06⁰⁰ – 27/3 06⁰⁰. Hitin í gjár: 2°
Minsti hiti máldur í apríl: -9,9° - Mesti hiti máldur í apríl: 18,3°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 6,0 mm – mált frá 26/3 kl. 06⁰⁰ – 27/3 06⁰⁰.
Avfallið higartil í apríl: 96 mm






## VESTFALLSKYRRINDI

| | |
|---|---|
| 6. apríl | Tendring |
| 7. apríl | Mánin næstur jørðini |
| 12. apríl | Fyrra kvarter |

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 8.apríl | 9:00 | 21:28 | 8:00 | 20:28 | 8:15 | 20:43 | 11:00 | 23:28 | - | 12:00 |
| 9.apríl | 9:58 | 22:28 | 8:58 | 21:28 | 9:13 | 21:43 | 11:58 | - | 0:28 | 12:58 |
| 10.apríl | 10:58 | 23:29 | 9:58 | 22:29 | 10:13 | 22:44 | 0:29 | 12:58 | 1:29 | 13:58 |
| 11.apríl | - | 12:00 | 11:00 | 23:30 | 11:15 | 23:45 | 1:29 | 14:00 | 2:29 | 15:00 |
| 12.apríl | 0:30 | 13:12 | - | 12:12 | - | 12:27 | 2:30 | 15:12 | 3:30 | 16:12 |

| Dagur | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 8.apríl | 7:15 | 19:43 | 6:15 | 18:43 | 9:15 | 21:43 | 10:15 | 22:43 | 8:45 | 21:13 | 10:00 | 22:28 |
| 9.apríl | 8:13 | 20:43 | 7:13 | 19:43 | 10:13 | 22:43 | 11:13 | 23:43 | 9:43 | 22:13 | 10:58 | 23:28 |
| 10.apríl | 9:13 | 21:44 | 8:13 | 20:44 | 11:13 | 23:44 | - | 12:13 | 10:43 | 23:14 | 11:58 | - |
| 11.apríl | 10:15 | 22:45 | 9:15 | 21:45 | - | 12:15 | 0:44 | 13:15 | 11:45 | - | 0:29 | 13:00 |
| 12.apríl | 11:27 | - | 10:27 | 23:10 | 0:45 | 13:27 | 1:45 | 14:27 | 0:15 | 12:57 | 1:30 | 14:12 |


Alt um harmonikur

www.simme.eu